Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður

Evni: Vaksnamannalæra og trípartasamstarv

Spurningar:
1. Ætlar landsstýrismaðurin at fremja avtalurnar viðvíkjandi yrkisútbúgvingum, ið vóru gjørdar í trípartasamráðingum í 2019 ?
2. Fer landsstýrismaðurin at taka upp trípartasamráðingar um vaksnamannalæru ?
3. Um ikki, hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin viðvíkjandi vaksnamannalæru ?

Viðmerkingar:
Tann 24. juni 2019 undirskrivaði táverandi landsstýri eina avtalu um yrkisútbúgvingarøkið við Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag og Landsfelag Handverkaranna/Føroya Handverkarafelag/Starvsmannafelagið.

At partarnir á arbeiðsmarknðinum og landsstýrið gjørdu eina tílíka semju var nýskapandi og slóðbrótandi fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Slík semja um mál av felags áhuga er við til framhaldandi menning av føroyska arbeiðsmarknaðinum, so hann kann tillagast broytingum í samfelagnum.

Trípartasemjan millum landsstýrið, arbeiðsgevarar og fakfeløgini fevndi m.a. um viðurskifti hjá lærlingum, fleiri læru- og praktikkpláss innan tað almenna, konjunkturjavnandi amboð av landsvegahaldi og umvæling av almennum bygningum, og um treytir í sambandi við útbjóðing við tí endamáli at útbúgva vinnuna.

Avtalað varð eisini, at farast skuldi undir eina nýggja trípartasamráðing á heysti 2019. Henda samráðing skuldi snúgva seg um at finna felags stev í samband við vaksnamannalæru. Landsstýrið fekk í 2018 handað *Álit um vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepil* við tilmælum um, hvussu vaksnamannalæra kann skipast í Føroyum. Sambært álitinum er tørvurin á vaksnamannalæru stórur, tí arbeiðsmarknaðurin og tey krøv, ið verða sett til førleikar hjá tí einstaka, broytast støðugt.

Kortini má staðfestast, at fleiri av átøkunum í avtaluni tíverri enn ikki hava sæð dagsins ljós, og at harafturat hoyrist einki um, at eitt nýtt umfar av trípartasamráðingum er tikið upp um vaksnamannalæru.

Á Løgtingi, 8. juni 2021

Eyðgunn Samuelsen